## Ferðafólk í Haiti

Meðan hjálparfólk í túsundatali stríðast við at bjarga neyðstøddum í haitiska høvuðsstaðnum Port-au-Prince, liggja útlendsk ferðafólk og sóla sær á einari strond har norðuri har norðuri í landinum einar 100 kilometrar frá býnum. Ferðafólkini, sum eru meiri enn 4.300 í tali, komu við ferðamannaskipinum Independence of the Seas fríggjadagin, og eitt annað skip hjá sama reiðaríi er á veg hagar, skrivar bretska blaðið The Guardian. Fleiri halda, at reiðaríið átti at broytt ferðaætlanina, so skipini kundu farið til okkurt annað land enn Haiti, nú fólk í túsundatali hava latið lív av jarðskjálvtanum har.



## Froskmaður smuglaði

Myndugleikarnir í Russlandi hava avdúkað eitt brotsmannalið, sum smuglaði sigarettir úr Estlandi til Russlands. Áin Narva er mark millum tey bæði londini, og myndugleikarnir siga, at ein froskmaður svam yvir um ánna við sigarettunum. Sigarettirnar vóru væl innpakkaðar og festar til búnan hjá froskmanninum. Ein talsmaður fyri russisku trygdartænastuna FSB sigur, at russiskir og estlendskir hermenn hava tikið fimm mans í sambandi við smuglaramálið. Teirra millum er tann 25 ára gamli froskmaðurin.

# Lívið er ein fantastisk søga



*– Tað ræður um at hava góð minni. Og so skalt tú minnast til, at tú kanst ikki leita minnini upp og vænta, at tú finnur alt í sama líki. Soleiðis er lívið ikki, segði Hans Jacob Glerfoss í samrøðu við Sosialin fyri nøkrum árum síðani*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Listamálarin og yrkjarin úr Mikladali doyði á sjúkrahúsi í Hirtshals sunnudagin. Hans Jacob Glerfoss gjørdist 72 ára gamal. Hann livdi lívið sum listamálari og yrkjari**

LIST
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

- Vínur mín, veist tú hví allir persónarnir líkjast mær so nógv?

Hans Jacob Glerfoss stendur framman fyri einum málningi av seinastu kvøldmáltíðini, sum hann arbeiðir við. Hann er heima og vitjar dóttrina, og blaðmaðurin og myndamaðurin á Sosialinum eru farnir at vitja hann. Árið er 2002.

Á myndini sita Jesus og lærusveinarnir um borðið, og Jesus hevur júst sagt orðini um, at »ein av tykkum fer svíkja meg.« Tað sæst á myndini, at okkurt er áfatt.

– Tað er tí, at eg havi allar hesar persónar inni í mær, svarar Hans Jacob Glerfoss sjálvur spurninginum.

– Tað eru tríggir av lærusveinunum, sum eg eri serliga góður við. Tað er Pætur, sum eg fegin vil vera. Tummas, sum er júst soleiðis, sum eg eri. Og so er tað Judas, hann sveik menniskjasonin við einum kossi, tað minnir meg eisini um meg sjálvan, sigur Hans Jacob Glerfoss.

Hann tosar róliga, hugsar seg stundum um og tekur sær tíð at finna røttu orðini. Og eina løtu hugleiðir hann eisini um lívið.

– Tað ræður um at hava góð minni. Og so skalt tú minnast til, at tú kanst ikki leita minnini upp og vænta, at tú finnur alt í sama líki. Soleiðis er lívið ikki, sigur hann.

Hann tekur eina sigarett burturúr pakkanum og stingur hana í munnin. Hann festir sær í og sendir roykin út í rúmið.

– Lívið er ein fantastisk søga.



### Málaði og yrkti

Hans Jacob Glerfoss, sum var føddur í Mikladali, men vaks upp í Kunoy, telist millum kendaru føroysku listamálararnar seinastu 40 árini. Hann var sjálvlærdur listarmaður, og miðskeiðis í 1960'unum var hann við á fyrstu framsýningunum. Seinni hevði hann eisini serframsýningar í Føroyum og í Danmark, og hann var við á ferðandi framsýningum saman við øðrum.

Sum listamálari málaði Hans Jacob Glerfoss nógvar landslagsmálningar, har myndaevnini ofta vóru úr norðoyggjum. Eisini vóru myndaevni av fólki, sum vóru til arbeiðis, eitt nú útróðrarmenn og handverkarar, ella í veitslu.

Hans Jacob Glerfoss yrkti eisini nógv. Í 1969 fekk hann M.A. Jacobsens heiðursløn fyri yrkingasøvnini.

### Flutti til Hirtshals

Hans Jacob Glerfoss búði